## Virðið á innflutninginum veksur framhaldandi

Innflutt varð fyri góðar 4.7 mia. kr. frá januar til november 2007. Hetta er ein vøkstur uppá 9% í mun til sama tíðarskeið 2006. Tá skip ikki verða tald við er vøksturin 7%. Vøksturin stavar serliga frá innflutningi av akførum, maskinum og aðrari útgerð eins og tilfari til brúk í vinnuligari framleiðslu, verður sagt av Hagstovuni. Innflutningurin til vinnuliga nýtslu (sí talvuna) er øktur við 10%, men innflutningsvirðið av brennievni er nú 7% lægri í mun til sama tíðarskeið 2006. Annars var innflutningurin til beinleiðis nýtslu í húsarhaldinum 6% størri í 2007. Vøksturin stavar serstakliga frá mati, drykkjuvørum og tubbaki. Hinvegin er innflutningurin av stuttleikabátum, húsvognum og akførum óbroyttur.

**Innflutningsvirðið: jan. – nov. 2006 og 2007 í mió. kr.**

| | 2006 | 2007 | Munur | % munur |
|---|---|---|---|---|
| Til vinnuliga nýtslu | 1.436 | 1.587 | 150 | 10 |
| Akfør, maskinur o.a. útgerð | 719 | 848 | 128 | 18 |
| Brennievni o.t. | 812 | 757 | -55 | -7 |
| Til beinleiðis nýtslu | 1.211 | 1.285 | 74 | 6 |
| Skip og flogfør | 121 | 208 | 87 | 72 |
| **Innflutningurin tilsamans** | **4.300** | **4.684** | **384** | **9** |
| Innflutningur uttan skip og flogfør | 4.179 | 4.476 | 298 | 7 |

# Svartkjaftaskip rokfiskiskap í føroyskum sjógvi



Meðan Carlton og Norðborg royna í føroy

**- Eingin ivi er um, at svartkjafturin fer at taka seg upp vestanfyri Írland, men hinvegin er ikki vist, at fiskiskapurin í føroyskum sjógvi fer at halda fram, nú svartkjafturin er á veg suður á leiðirnar at gýta, siga tey á Havsbrún**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hava nøkur føroysk svartkjaftaskip fingið nógvan svartkjaft einar 130-140 fjórðingar beint suður úr Føroyum.

Fagraberg kom á Fuglafjørð síðstu nátt við umleið 3.100 tonsum, og væntandi kemur Carlton við 1500 tonsum í morgin.

Á Havsbrún siga tey, at skipini hava fingið uppí í føroyskum sjógvi eftir fáum døgum.

Umframt Fagraberg, Carlton og Norðborg, eru eisini russar og onkur íslendskur bátur á leiðini.

Í dag landar íslendski báturin Aðalstein Jónsson í Fuglafirði. Hetta er ein verksmiðjubátur, sum er heimahoyrandi á Eskisfjørðinum. Havsbrún keypir umleið 400 tons av veiðini til ídnað og nakað av frystum verður lagt upp til Bergfrost.

Íslendski báturin hevur eisini roynt í føroyskum sjógvi.

Á Havsbrún siga tey, at lastin, sum Carlton væntandi kemur við í morgin, er hin sjeynda, sum verður løgd upp í Fuglafirði higartil í ár.

Føroyski svartkjaftaflotin er tvíbýttur í løtuni.

Meðan nøkur skip hava havt rokfiskiskap í føroyskum sjógvi, eru onnur skip støðd á leiðunum vestanfyri Írland, har svartkjafturin plagar at taka seg upp í endanum av hesum mánaðinum.

- Fýra skip eru har suðuri í írskum sjógvi, og hesi eru Christian í Grótinum, Tróndur í Gøtu, Finnur Fríði og Jupiter.

Skipini, sum eru í írskum sjógvi, skulu taka støðu til, um tey skulu bíða, til svartkjafturin tekur seg upp á leiðini– ella, um tey skulu leggja leiðina norður í føroyskan sjógv og fáa lut í tí "rendi", sum hevur tikið seg upp her.

- Eingin ivi er um, at svartkjafturin fer at taka seg upp vestanfyri Írlandi, men hinvegin er ikki vist, at fiskiskapurin í føroyskum sjógvi fer at halda fram, nú svartkjafturin er á veg suður á leiðirnar at gýta. Fiskurin hevur verður norðanfyri og etið seg feitan, og nú er hann á veg suður á gýtingarleiðirnar.

Á Havsbrún siga tey, at talan saktans kann vera um eina torvu, sum skipini hava rent seg í sunnanfyri Føroyar – ein torva, sum knappliga kann vera burtur, áðrenn tú veitst av.

- Svartkjafturin er nú á veg suður á leiðirnar vestanfyri Írland. At skipini gera eitt "rend" í føroyskum sjógvi, áðrenn fiskiskapurin tekur seg upp á gýtingarleiðunum, er ikki óvanligt. Viðhvørt tekur fiskurin seg upp sunnanfyri ella viðhvørt eystanfyri í føroyskum sjógvi.

Tá ið svartkjfturin hevur gýtt vestanfyri Írland, tekur hann seg norðuryvir, og tá ið komið er út í apríl mánaða, plagar fiskiskapurin at taka seg upp í føroyskum sjógvi.

Havsbrún tók ímóti fyrstu lastunum úr føroyskum longu 10. januar í fjørm, og tá vóru flestu føroysku skipini í okkara sjógvi.

- Seinast í januar mánaða í fjør tóku vit so ímóti teimum fyrstu lastunum av Írlands-leiðunum, siga tey í Fuglafirði.

Eitt skifti í fjør vár var rættiligt prískríggj um svartkjaftin. Henda kapping var serliga millum donsk og norsk virkir, og á Havsbrún í Fuglafirði mistu tey eini 30.000-40.000 pund, tí virkið helt tað ikki vera ráðiligt at vera við í hesum prískríggi.

- Sum tíðin leið, sóu vit, at okkara avgerð var røtt, tí grundarlag var ikki fyri tí prísi, sum norsku og donsku virkini góvu fyri fiskin.

Á Havsbrún siga tey annars, at útlit eru til, at onkur norsk landing verður á Havsbrún, sum tíðin líður.

- Vit hava skilt á norðmonnum, at reiðaríir eru misnøgd við sonevnda noxavgjaldið, sum myndugleikarnir hava samtykt at leggja á hesa veiði. Hetta er eitt umhvørvisavgjald.

Í Fuglafirði siga tey, at enn er ov tíðliga at siga, hvørja ávirkan hetta avgjald fær á møguligar landingar í Føroyum.

- Men vit hava skilt, at vit kunnu rokna við onkrum uppringingum um landing, siga tey á Havsbrún.

# Deydlig byrjan á Beta í Saltangará

**Seinni í vikuni verða væntandi fleiri landingar í Saltangará, tá ið partrolararnir koma aftur av túri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár og í dag hevur lítið landingarvirksemi verið á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará.

Einasta skipið, sum hevur landað hesar báðar dagarnar, er línuskipið Stapin, sum landaði eini 40.000 pund í gjár. Hetta var ein lutfalsliga stuttur túrur, tí Stapin landaði eisini seinasta mánadag.

Seinni í vikuni koma ísfiskatrolararnir Stelkur, Bakur, Rókur og Lerkur væntandi inn at landa. Um bátarnir koma í morgin, hósdagin ella fríggjadagin, var ikki greitt, tá ið vit frættu fyrrapartin í dag.

Í Saltangará verður eisini roknað við, at Polarhav og Stjørnan koma inn at landa seinast í vikuni. Ivasamt er tó, um báðir bátarnir fara at landa í Saltangará.

- Óhugsandi er ikki, at Polarhav og Stjørnan kanska fara at draga túrin út til mánadagin, siga tey í Saltangará.

Góði upsafiskiskapurin, sum partrolararnir høvdu herfyri, er heldur lakari nú, men skipini fáa framvegis væl av fiski.

- Ein vika, sum gevur einum "pari" eini 340.000-360.000 pund, er jú ikki ring, siga tey á Beta.



*Upsafiskiskapurin er eitt sindur lakari í løtuni, men skipini fáa framvegis væl av fiski*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*